

# Úr Texas til russiska Arktis umvegis Føroyar

**Jan Müller**

14.05.2014 - 16:53

Oljan.fo

Síðani oljuvinnan tók seg upp í norskum og bretskum øki hava Føroyar alsamt oftari verið brúktar sum staðið til manningarskifti, bunkring og proviantering. Eisini at kroka í, tá ov baldrutt hevur verið hjá mongu frálandaskipunum um okkara leiðir.

Tað er tó ikki hvønn dag, at seismikkskip leggja at landi her á leiðini úr Caribia til Barentshavið. Men tað hendi í morgun, tá stóra seismikkskipið Geo Celtic kom á Havnina at skifta manning, taka útgerð og bunkra. Skipið, sum kemur úr Galvestone í Texas, hevur arbeitt í Meksikanska flógvanum og skal nú til Barentshavið at vera partur av oljuvirkseminum har. Skipið hevur fingið eina heldur óvanliga uppgávu, og hon er at skjóta seismikk í russiskum øki eystan fyri Novaja Semja, har einki oljuvirksemi yvirhøvur hevur verið.

Tað er Thor í Hósvík, sum er agentur fyri skipið. Jens Pauli Nielsen, sum starvast hjá Thor og tekur sær av samskiftinum við mongu skipini, ið leggja at landi í Føroyum, sigur, at hóast tað kann vera langt ímillum skipini, so eru hesar vitjanir eitt gott íkast hjá felagnum. Teir eru umboð fyri tey flestu seismikkskipini, ið koma henda vegin.

Geo Celtic telist millum tey størstu seismikkskipini í heiminum. Fyrr var tað norskt, nú er tað felag í Fraklandi, sum rekur skipið. Eingin føroyingur er við skipinum hesaferð, men tey fyrstu trý árini, tá skipið var nýtt ein av juvelunum í seismikkkrúnuni, tá var skiparin føroyingur, John Leivsgarð úr Klaksvík og yvirstýrimaðurin var Oskar Johannesen.






